# Fuglafjørður brynjar seg til barnaverndarøkið



*-Vit hava leingi havt ætlanir um at seta eina sosiala deild á stovn, og tú kanst siga, at nýggja barnaverndarøkið hevur skumpað undir gongdina, sigur borgarstjórin í Fuglafjarðar kommunu, Sigurð Simonsen*

*Mynd: Savnsmynd*

**-Vit hava bjóðað bæði Gøtu- og Leirvíkar kommunu at samstarva við okkum á barnaverndarøkinum. Tá verða vit 3.600 fólk, og tað haldi eg er ein hóskandi eind, sigur Sigurð Simonsen, borgarstjóri í Fuglafjarðar kommunu**

KOMMUNU-POLITIKKUR
*Páll Holm Johannesen*
*pall@sosialurin.fo*

- Kommunurnar fáa størri og størri ábyrgd á sosiala økinum, og vit eru noydd at fylgja við. Vit umsita í dag barnagarðsøkið og part av eldrarøktini, og í næstum yvirtaka vit eisini barnaverndarøkið. Vit hava leingi havt ætlanir um at seta eina sosiala deild á stovn, og tú kanst siga, at nýggja barnaverndarøkið hevur skumpað undir gongdina, sigur borgarstjórin í Fuglafjarðar kommunu, Sigurð Simonsen

Í bløðunum seinastu dagarnar sæst at lesa, at Fuglafjarðar kommunu søkir eftir einum sosialráðgeva, ið skal vera leiðari á eini nýggjari sosialari deild, sum kommunan ætlar at seta á stovn.

Kommunan verður sostatt tann fjórða í røðini, ið skipar seg við eini sosialari deild. Hinar kommunurnar eru Tórshavnar-, Klaksvíkar- og Runavíkar kommuna.

### Tætt samstarv

Nýggja barnaverndarlógin, sum løgtingið samtykti 8.mars í ár, áleggur kommununum at finna saman í samstarvseindir ella barnaverndarøki á í minsta lagi 1500 fólk. Í dag búgva 1600 fólk í Fuglafjarðar kommuna, men borgarstjórin vónar kortini, at Fuglafjørður gongur saman við øðrum kommunum á barnaverndarøkinum.

- Vit hava bjóðað bæði Gøtu- og Leirvíkar kommunu at samstarva við okkum á barnaverndarøkinum. Tá verða vit 3.600 fólk, og tað haldi eg er ein hóskandi eind, heldur Sigurð Simonsen.

Hvørki Gøtu- ella Leirvíkar kommuna hava svarað innbjóðingin úr Fuglafirði, men eftir ætlan fær Fuglafjarðar kommuna endaligt svar frá grannakommununum eftir summarfrítíðina.

### Tænastan mannað

1. januar verður barnaverndarøkið endaliga lagt út til kommunurnar. Nýggja barnaverndarlógin leggur upp til, at kommunurnar skipa seg við eini barnaverndarnevnd og eini barnaverndarfyrisiting. Ætlanin er, at kommunurnar velja borgarar at manna barnaverndarnevndina, meðan barnaverndarfyrisitingin verður mannað av fólki, ið hava ein fakliga førleika á økinum.

Fuglafjarðar kommuna hevur longu mannað barnaverndarnevndina. Teir tríggir limirnir í nevndini eru Malena í Lambanum, ið er forkvinna, Hans Jacob Hansen og Ásla Sevdal.

Sosiala økið í dag er kostnaðarmiklasti posturin hjá Fuglfjarðar kommunu. Sosiala økið fer avstað við millum 20-25% av samlaðu fíggjarætlanini hjá Fuglafjarðar kommunu.

J. Broncks gøta 37 · Postsboks 370 · FO-110 Tórshavn
Tlf: 34 59 00 · Fax: 34 59 50 · booking@smyril-line.fo
WWW.SMYRIL-LINE.COM

100 FYRI 200

Njótið 3 avslappandi dagar umborð á Norrönu

18.-20. juli

Vit selja nú aftur 100 ferðaseðlar til Noregs og aftur fyri einans...

kr. 200,-

fyri hvønn – øll avgjøld eru íroknað.

Tey fyrstu fáa tey bestu kømrini, so bíleggið ferðina NÚ á 34 59 00



Sertilboð

Droym tað ikki – royn tað!